# Borgarstjórin visti av øllum

**Tað er ikki í tráð við veruleikan, tá Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvági, sigur, at hann ikki visti, hvat stóð í samgonguskjalinum, sum ætlaði meirilutin í bygdarráðnum í Sørvági hevði við sær á fyrsta fundin hjá nýggja bygdarráðnum, sigur Sune Jacobsen, bygdarráðslimur**

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*



*Kommunuskrivstovan í Sørvági var týskvøldið karmur um eina politiska hending, sum ikki stendur aftan fyri tær í stóru verð, tá vald skal býtast*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Tað er ósatt, tá Jákup Suni Lauritsen, nývaldur borgarstjóri í Sørvági, sigur, at hann ikki kendi til samgonguskjali, sum skuldi liggja sum grund fyri arbeiðinum hjá Sørvágs Kommunu komandi valskeið, fyrr enn stutt fyri fundin, har borgarstjórin varð valdur, sigur Sune Jacobsen, bygdarráðslimur í Sørvági.

Sanna støðan er tann, sigur Sune Jacobsen, at tað var spælt við opnum kortum allan vegin frá tí, valið hevði verið, til fundin týskvøldið.

– Altso frá okkara síðu, leggur hann dent á, og er ikki í iva um, at okkurt var ávegis hinumegin borðið, sum hann tekur til, sum ikki varð ætlað honum at vita.

– Vit tosaðu saman, bygdarráðslimir av øllum listum soleiðis av og á aftan á valið. Avgjørt varð, at vit skuldu hava ein felags fund leygardagin í seinastu viku. Men tann fundurin varð avlýstur orsakað av sjúku.

### Gjørdu avtalu

Men áðrenn tað høvdu vit tríggir, sum valdir vóru á okkara lista, saman við bygdarráðsliminum á lista A havt ein fund, har vit høvdu lagt okkara ynski fram. Tað vil siga, hvør var áhugaður í at gerast borgarstjóri, um tað kom so langt.

Bæði Jákup Suni Lauritsen og Sune Jacobsen vóru áhugaðir í hesum og tí stóð tað til hinar báðar limirnar í hesi samgonguni, hvønn teir skuldu velja til formann.

Avgjørt varð, greiðir Sune Jacobsen frá, at teir skuldu bjóða hinum eftirverandi listanum varaborgarstjóran, og har skutu teir sjálvir upp at velja Erik Davidsen.

Tá teir fóru hvør til sítt, var avtalan, greiðir Sune Jacobsen frá, at líka mikið hvørja støðu restin av bólkinum kom til, skuldu báðir partar góðtaka tað. Eingin skrivlig avtala varð gjørd um tað, tí tað samdust vit um, var ikki neyðugt, sigur hann.

Hinir báðir bygdaráðslimirnir í samgonguni, sum gjørd var, gjørdu so av at skjóta Suna Jacobsen upp sum borgarstjóra, greiðir hann frá. Av tí, at teir høvdu avtalað, at tann avgerðin skuldi virðast, varð ikki meira hugsað um tað, sigur Sune Jacobsen.

Leygardagin brúkti Sune Jacobsen sman við bygdarráðsliminum av lista A til at skriva eit samgonguskjal, har teir tóku ymsar partar av tí, allir lsitarnir undan valinum høvdu sagt seg vilja arbeiða við, og sjóðaðu saman til eitt skjal, sum saman við einum brævi varð borið til allara nývaldu bygdarráðslimirnar.

– Allir bygdarráðslimirnir fingu hesi bæði skrivini, og eingin kann koma og siga nú, at tey ikki kendu til tey. Heldur ikki nývaldi borgarjórin, sigur Sune Jacobsen. Í fylgiskrivinum var eisini gjørt púra greitt, at hetta var eitt uppskot, sum tey kundu gera viðmerkingar til ella bara koyra burtur. Men har kom eingin reaktión, sigur Sune Jacobsen.

Ikki fyrr enn møtt varð til fudnin, har borgarstjórin skuldi veljast. Tá fekk hann ein gruna um, at har var okkurt annað í umbúna, enn tað, hann helt avtalu vera um, sigur Sune Jacobsen. Tí limir av C listanum komu úr einum rúmi saman við Jákupi Suna Lauritsen. Men teir noktaðu fyri, at nakar fundur hevði verið, ella at nøkur avtala var gjørd teirra millum.

### Ólógligur fundur

Sune Jacobsen sigur, at hann ivast í, um fundurin, sum valdi borgarstjóra og varaborgarstjóra, yvirhøvur var lógligur.

Sambært lógini um kommunustýri skal ein slíkur fundir fráboðast í minsta lagi fýra dagar, áðrenn hann verður hildin. Hesin fundurin varð hildin týskvøld, men bygdarráðslimirnir fingu ikki fundarboðini fyrr enn mánadag.

Thordis Skaalum, sum er fyrst valdi bygdarráðslimur í Sørvági, kallaði inn til fundin.

Hon sigur, at hon hóskvøld bað kommunuskrivaran um at senda bygdarráðslimunum bræv um at møta á fundi týsdag. Brøvini vórðu send við posti fíggjadag. Thordis Skaalum váttar, at tey vóru ikki limunum í hendi fyrr enn mánadag.

Sune Jacobsen vísir á, at fundurin var heldur ikki almennur, sum slíkir fundir eiga at vera.

Hann sigur, at hann veit, at fólk var við dyrnar og ætlaði sær á fundin sum áhoyrarar, men at tey vórðu víst burtur av einum av bygdarráðslimunum, sum er við í tí bólkinum, sum valdi borgarstjóran.

Hesum vísir Thordis Skaalum aftur. Hon sigur, at henni kunnugt var einki menniskja, sum vildi sleppa á fundin. Ein annar fundur var í kommunuhúsinum sama kvøld. Tað var tekniska nevnd, sum hevði fund um eitthvørt mál, hon skuldi viðgera. Annar var eingin, og eingin vildi sleppa á fundin, sum valdi borgarstjóra, sigur hon.

Til uppáhaldið, at fundurin ikki var lógliga innkallaður, sigur Thordis Skaalum, fyrstvaldi bygdarráðslimur í Sørvági, at um so er, er hon fús at kalla inn til nýggjan fund, um tað verður ynskt ella kravt.

– Men, leggur hon afturat. Eg vænti ikki, at tað fer at broyta úslitið av atkvøðugreiðsluni nakað petti.

DAT fingið loyvi at flúgva til Føroya:

# Fyrsti túrurin verður tann 18. december




Danish Air Transport hevur nú fingið loyvi at byrja flúgving til Føroya. Flogið verðurí fyrsta umfari um jóltíðir.

Byrjað verður 18. decemner og flogið til tann 23. december. Síðan aftur 26. og 27. december og 2. januar.

Kannað verður eftir, um til ber at millumlenda í Aalborg á ferðunum til og úr Føroyum, sigur DAT í tíðindaskrivi. Hendan millumlendingin verður tó ikki á hvørjum túri, skilst á tíðindaskrivi, sum Danish Air Transport hevur sent út í samband við, at felagið hevur fingið loyvi at byrja fúgving til Føroya.

Meira fæst at vita um Føroyaflúgvingina á heimasíðuni hjá felagnum, sum eitur www.dat.dk, har eiisni prísir og feraætlan er at síggja.

**ej**



Dánjal Andreassen, komandi borgarstjóri:

# Vegaføringin skal loysast beinanvegin

**Dánjal Andreassen, sum eftir 1. januar verður nýggjur borgarstjóri í Leirvík, sigur, at mest átroðkandi hjá nývalda bygdarráðnum verður at fáa loyst málið um vegaføringina úr Norðoyartunlinum. – Hetta er eitt mál, sum mál loysast beinanvegin, tí annars fer tað at taka ein alt ov stóran part av orkuni hjá bygdarráðnum**

SAMRØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Vegaføringin úr Norðoyartunlinum og gjøgnum Leirvíksbygd er tað málið, sum upptekur leirvíkingar mest og vit, sum nú eru vald at stýra kommununi næstu fýra árini, noyðast saman við landsmyndugleikunum at finna skjótastu og bestu loysnina, sum leirvíkingar kunnu taka undir við, sigur Dánjal Andreassen, komandi borgarstjóri í Leirvík*

Tað var bert ein listi, sum stillaði upp til bygdarráðsvalið í Leirvík hesaferð. Á listanum vóru 10 valevni, og Dánjal Andreassen varð fyrstvaldur við tilsamans 88 atkvøðum. Hetta var eitt gott val hjá Dánjali, men ikki met í atkvøðum. Á valinum undan hesum fekk Sjúrður Eliasen, sum hevur verið borgarstjóri í Leirvík seinastu árini, 92 atkvøður. Hann og trý onnur lótu seg ikki stilla uppaftur. Hini eru Tórhild Bjarkhamar, Guðrið Lava Olsen og Tummas Justinussen.

Hóast bert ein listi stillaði upp til kommunuvalið hesaferð, var áhugin fyri valinum stórur millum leirvíkingar. Valluttøkan var um 90%, og tað er stór luttøka.

Ein veljarafundur var í Leirvík eina viku fyri valið. Hesin var í skúlanum, og øll valevnini vóru við uttan tann eini. Stórur áhugi var fyri fundinum, har eini 120 veljarar nýttu høvi at lýða á og seta fram spurningar.

Høvuðsmálið á hesum fundi var vegaføringin í sambandi við, at Norðoyartunnilin verður liðugur og sambært ætlanini letur upp um smá tvey ár.

### Tók ikki støðu

Dánjal Andreassen sigur, at hann á veljarafundinum legði stóran dent á, at málið um vegaføringina úr Norðoyartunlinum má loysast, áðrenn tunnilin letur upp.

– Men av tí, at eg ikki kenni tær ætlanir, sum frammi hava verið, til lítar, tók eg ikki støðu til, hvørja loysn, eg kundi hugsað mær, at vit fingu. Hinvegin gjørdi eg greitt, at eg eri hart ímóti, at vegaføringin verður løgd omanfyri bygdina og niðanfyri bygdarhúsið, har framtíðin við setahúsabygging í kommununi liggur. Hesi loysnini taki eg slett ikki undir við.

Dánjal sigur, at fleiri loysnir hava verið frammi, men hann er í løtuni ikki nóg væl kunnaður um tær fyri at kunna taka dagar ímillum hesar loysnir.

– Eg haldi, at fráfarandi bygdarráð hevur gjørt eitt gott arbeiði, og eg veit, at einasta ítøkiliga loysnin, sum er á "tapetinum" í løtuni, er ein tunnilsloysn undir Leirvíksbygd, sum løgtingið og fráfarandi bygdarráð hava samtykt skal fremjast.

Hann heldur, at fráfarandi bygdarráð hevur verið í góðari trúgv, men so hvørt, sum tíðin er liðin, er tað vorðið meira og meira ivingarsamt, hvussu nær tunnilsloysnin er.

Komandi borgarstjórin í Leirvík ivast stórliga í, um tunnilsloysnin verður framd í bræði, soleiðis sum fíggjarvánirnar í samfelagnum eru.

### Skjót loysn

- Vegaføringin úr Norðoyartunlinum, sum nærkast í hvørjum, skal loysast sum skjótast, soleiðis at ferðsluviðurskiftini í Leirvík verða nøktandi, tá ið tunnilin letur upp. Vit kunnu ikki bíða eftir eini møguligari tunnilsloysn í fleiri ár, meðan ruðulleiki fer at valda á ferðsluøkinum. Tí mugu vit miðja eftir, at hesi viðurskifti eru loyst, tá ið tunnilin letur upp um sløk tvey ár.

Dánjal sigur, at hann kennir ikki nóg væl til tey uppskot, sum frammi hava verið um fjøruveg, men hann hevur hug at hella seg til eina slíka loysn – og um ikki annað, soleiðis at hetta verður ein fyribilsloysn, til tunnilin undir bygdini kemur.

– Eg haldi, at tað, sum er avgerandi, er, at vit fáa eina skjóta og góða loysn, sum leirvíkingar kunnu taka undir við, sigur hann.

Tað hevur eisini verið frammi um at leggja vegaføringina úr Norðoyartunlinum omanfyri bygdarhúsið, men sum Dánjal hevur skilt, kunnu trupulleikar her standast av omankoyringini, tí hon verður nakað brøtt.

- Vegaføringin úr Norðoyartunlinum og gjøgnum Leirvíksbygd er tað málið, sum upptekur leirvíkingar mest og vit, sum nú eru vald at stýra kommununi næstu fýra árini, noyðast saman við landsmyndugleikunum at finna skjótastu og bestu loysnina.

Dánjal væntar, at hetta málið náttúrliga fer at fylla so nógv hjá nývalda bygdarráðnum, at tað má loysast beinanvegin, soleiðis at tíð og orka verður til onnur mál, sum arbeiðast skal við komandi fýra árini.

### Halda fram

Hann fegnast um, at formaðurin í teknisku nevnd hjá Leirvíkar kommunu, Poul Andrias Joensen og Joen Magnus Rasmussen, sum eisini er limur í teknisku nevnd, framvegis eru í bygdarráðnum og halda fram í hesi nevnd – eisini eftir 1. januar.

– Teir hava saman við øðrum, sum eru eftir í bygdaráðnum, alla ta vitan um hetta mál, sum nú einaferð er tøk, og vit fara saman at royna at finna skjótastu og bestu loysnina, sum fólk í Leirvík kunnu taka undir við. Eisini vænti eg, at fráfarandi borgarstjórin, Sjúrður Eliasen, er sinnaður at lata vitan, hann hevur um hetta mál, til okkum, sum fara at stjórna kommununi komandi fýra árini, sigur Dánjal Andreassen, komandi borgarstjóri, at enda.



*– Neyðugt er, at ferðsluviðurskiftini í Leirvík verða nøktandi, tá ið Norðoyatunnilin letur upp. Vit kunnu ikki bíða eftir eini møguligari tunnilsloysn í fleiri ár, meðan ruðulleiki fer at valda á ferðsluøkinum, sigur Dánjal Andreassen*